Landsspítali



# Epidural

## Epidural pínuviðgerð

Í sambandi við serstakar skurðviðgerðir verður eitt epidural-kathetur lagt inn í ryggin, tað er í rúmið runt mønuna (epiduralrúmið), ætlað til pínuviðgerð undir og eftir skurðviðgerð.
Medisin verður sprænt inn við pumpu í eini nøgd, sum er hóskandi til skurðviðgerðina.

## Hvussu verður epidural-kathetur lagt?

Í síðulegu verður lokaldoyving sprænd í  húðina. Ígjøgnum eina nál verður eitt sera tunt plastrør (epidural-kathetur) ført inn í epiduralrúmið. Nálin verður tikin burtur og epidural-kathetrið verður fest við plástri. Kathetrið er so klænt, at hetta ikki merkist, tá ligið verður á bakinum.
Hetta tekur uml. 10-15 min.



## Hvussu virkar pínuviðgerðin?

Tá lokaldoyving verður sprænd inn í epiduralrúmið, forðar tað fyri, at pína flytur seg frá skurðstaðnum til ryggmønuna. Í stuttum kann sigast, at heilin fær als ikki boð um nakra pínu.

## Hvussu nógv medisin tolir ein?

Eingin vandi er fyri medisineitran í sambandi við epidurala pínuviðgerð. Medisin verður givið, sum er hóskandi til skurðviðgerðina.

## Hvussu leingi skal epidural-kathetrið nýtast?

Triðja dagin verður kathetrið aloftast tikið burtur, og pínuviðgerðin heldur  fram við medisini í droppið ella við tablettum eftir tørvi.

## Eru hjáárin í sambandi við epidurala pínuviðgerð?

Tað eru sjúklingar, sum kenna  vaml ella hava svimbul, og nakrir kenna minni megi í beinunum. Hjáárinini hvørva, tá viðgerðin er liðug.

## Komplikatiónir í sambandi við viðgerðina?

Tær eru fáar.  Uml. 1%  fáa høvuðpínu í sambandi við epidurala pínuviðgerð. Høvuðpínan er ikki vandamikil og hvørvur ein til tveir dagar eftir viðgerðina.

Verður epidural-kathetrið liggjandi meiri enn tríggjar dagar, økist váðin fyri, at bruni kemur rundan um kathetrið í rygginum. Sjúkrarøktarfrøðingur kannar regluliga epidural -kathetrið og húðina runt kathetrið. Epidural-katherið verður aloftast tikið burtur triðja dagin, um støðan hjá sjúklinginum loyvir tí.



## Pínuviðgerð eftir skurðviðgerðina?

Anestesilæknin ger eina ætlan um, hvørja pínuviðgerð tú skalt hava eftir skurðviðgerðina. Við medisini í epidurala kathetrinum er møguligt at gerast nærum pínuleys/-ur.

Tú skalt vera pínuleys/-ur  tá tú liggur friðarlig/-ur í seingini.



Hostar tú ella skalt tú úr seingini, verður pínan størri,, men hon má ongantíð gerast so ring, at tú ikki torir at hosta ella flyta teg í seingini. So er neyðugt at broyta pínuviðgerðina.

Fyri  nágreiniligari at meta um pínuna verða brúkt tøl frá 0 – 10:

0 = Pínuleys/-ur
10 = Sera nógv pína

**Visuel Analog Skala**

**Pínuleys/-ur**

**0  1  2  3  4  5  6  7  8  9  10**

**Sera nógv pína**

Ide: Doc. Staffan Amér. Karolinska Sjukhuset

Tú skalt við tølunum meta um pínuna:
Frá 0 – 3 = Ikki nógv pína
Frá 4 – 5 = Pína í smb. við hosta og flyting í og úr seingini.
Er pínan millum 4 – 5 í hvílustøðu, skal pínuviðgerðin broytast.
Frá 6 – 10 = Sera nógv pína. Pínuviðgerðin skal broytast.

Vegna Anestesideildina
Elin H. Jensen, anestesiyvirlækni
Jonna O. Hansen, anestesisjúkrarøktarfrøðingur

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo